# Føroyska luttøkan í oljuvinnuni u

**- Tað, sum upp á sikt tænir okkum best í løtuni, er, at føroysk feløg fáa ein leiklut í oljuvinnuni uttanlands, eins og eitt nú Atlantsflog hevur fingið sáttmálar í Noregi og Thor í Hósvík hevur fingið sáttmálar ymsastaðni kring knøttin við sínum virksemi. Á henda hátt kunnu føroysk feløg luttaka í oljuvirksemi alt árið, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum. Formaðurin í havnanevndini hjá Runavíkar kommunu, Klæmint Østerø, er samdur við stjóran í Vinnuhúsinum**

OLJULEITING
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, er samdur við Magna Arge, stjóra í Atlantsflogi um, at tað hevði tænt føroysku tænastuvinnuni betur, um ætlaðu boringarnar á føroyska landgrunninum hjá ávikavist Statoil í 2006 og boringin hjá BP í 2007, høvdu ligið í forleingilsi av hvørji aðrari og ikki í hvør sínum ári, sum annars liggur í kortunum.

Teir halda báðir, at tá ið tíðarskeiðið er so stutt, sum tað vanliga er í einum boriskeiði, er torført hjá tænastuvinnuni í Føroyum seta nakað veruligt á kjøl.

Stjórin í Atlantsflogi heldur, at tað bæði hevði tænt føroysku tænastuvinnuni og oljufeløgunum, um báðir brunnarnir, sum skulu borast á basaltinum, vórðu boraðir í sama ári.

- Hetta hendi eitt nú í fyrstu útbjóðingini, og tað kom sera væl við hjá vinnuni, sigur Magni Arge.

Men ymiskar orsøkir kunnu liggja til grunds fyri, at brunnarnir ikki verða boraðir í sama ári.

## Upp á sikt

Jan Mortensen ivast ikki í, at tænastuvinnan hevði fingið mest burtur úr boringunum, um tær lógu hvør eftir aðrari, tí tá hevði tíðarskeiðið, har virksemið var í landinum, verið longri.

Stjórin heldur hinvegin, at tað er ikki hetta, sum hevur størstan týdningin fyri føroysku tænastuvinnuna.

- Tað, sum upp á sikt tænir okkum best í løtuni, er, at føroysk feløg fáa ein leiklut í oljuvinnuni uttanlands, eins og eitt nú Atlantsflog hevur fingið í Noregi og Thor í Hósvík hevur fingið ymsastaðni kring knøttin við sínum virksemi. Á henda hátt kunnu føroysk feløg luttaka í oljuvirksemi alt árið.

Jan vísir á, at boringarnar vanliga ikki taka langa tíð, men nú farast skal niður ígjøgnum basaltið, er væntandi, at tíðin verður nakað longri, enn hon hevur verið við undanfarnu boringar.

- Eg dugi ikki at meta um, hvussu langa tíð hesar boringar fara at taka, men eg kann hugsa mær, at sjálvar boringarnar fara at vara nakað longri enn ein mánaða, kanska tveir mánaðir ella meira.

Hann sigur, at basaltfláirnar eru ringar at bora – og farið verður langt niður.

Jan sigur, at eitt eru so sjálvar boringarnar; annað er fyrireikingarnar, áðrenn borurin verður settur í havbotnin.

- Eg vóni sjálvsagt, at føroyska tænastuvinnan fer at fáa nakað burtur úr hesum – men ikki minst; at teir aktivitetir, sum verða her heima, meðan borað verður, fara at skapa fleiri føroyskum feløgum enn higartil møguleikar í oljuvinnuni uttanlands

Hann vísir á, at sum er, eru tað ikki onnur føroysk feløg enn Atlantsflog og Thor, sum hava nakað munandi virksemi í oljuvinnuni uttanlands.

- Men kanska verður møguleikin, sum nú stendur fyri framman, startskotið hjá øðrum feløgum at fáa lut í hesi vinnu, sigur hann.






*Thor í Hósvík hevur rættiliga gjørt vart við seg sum veitarar í oljuvinnuni kring um heimin*